

## Landsstýrið við nýggjari lánsbrævarøð

Landsstýrið gevur út nýggja lánsbrævarøð. Lánsbrøvini verða listað 10. juni 2009 á virðisbrævamarknaðunum í Reykjavík og Keypmannahavn. Lánsupphæddin er í navnvirði 1.900 mió krónur, sum við kurs 94,96 svarar til 1.804,2 mió krónur, sigur Landsbankin. Peningurin verður lutvíst brúktur til at fíggja hall á fíggjarlógini - 500 mió krónur- og lutvíst til at endurfíggja brævalán sum fella til gjaldingar í ár - 1.018 mió krónur. Ein partur - 286 mió ´krónur - verður brúktur til framskundaða afturgjalding av brævlánum. Lánið er eitt 3-ára standandi lán, sum fellur til gjaldingar 11. juni 2012. Rentan til íleggjarar er 3,808% p.a. Lántøkan er fyrireikað av Landsbanka Føroya og Nordea Bank, og lánsbrøvini eru seld í Føroyum og uttanlands, sigur Landsbankin.

# Nebbasild ger landgongd í Føroyum

**Náttúruviðurskiftini í havinum eru rættiliga við okkum í løtuni, og øll útlit eru til, at toskastovnurin fer at mennast aftur. Nógv nebbasild er, og hetta eigur eisini at síggjast aftur í sjófuglinum, sum tíðin gongur. Sosialurin hevur prátað við lívfrøðingin, Kirstin Eliassen, sum skrivar phd-verkætlan um nebbasild, og í samrøðuni sigur hon frá áhugaverdum søgum um nebbasild og tosk í føroyskum sjógvi**



NÁTTÚRA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er mangt, sum bendir á, at fiskur og sjófuglur fara at hava betri dagar í okkara sjógvi og við Føroyar, enn tey hava havt seinastu árini. Gróðurin á landgrunninum var rímiliga góður í fjør, serliga tíðliga í árinum, og alt bendir á, at gróðurin eisini verður góður í ár. Eitt er, nær gróðurin byrjar, og annað er, hvussu leingi gróðurin heldur á.

Gróðurin er grundarlagið undir øðrum lívi í havinum, eitt nú nebbasildini, sum aftur er grundarlagið undir fiski og sjófugli.

Alt bendir á, at nebbasildastovnurin í føroyskum sjógvi rættiliga er við at koma fyri seg, og í sínum kanningum staðfesti Havstovan í fjør, at týðiligar ábendingar eru um hetta.

Havstovan ger yngulkanningar um mánaðarskiftið juni/juli, og tá fæst ein nýggj ábending um, hvussu støðan hjá nebbasildini er.

Fiskimenn hava sagt frá nógvari nebbasild í fiski, sum verður kruvdur, og á landi er eisini onkur ábending um, at okkurt veruliga er við at henda í sjónum.

Tá undirritaði var ein stuttleikatúr við sleingitráðuni eina løtu mikukvøldið, krókti lítli sílapilkurin seg fastan í tríggjar stórar nebbasildir úti í Sandágerði. Í sjónum sást lív, og tað sást eisini, at røringur var ymsastaðni uppi í vatnskorpuni.

Havi ongantíð upplivað áður at fingið nebbasild á tráðu, tó at seiðatráða, seiðapilkur og seiðapláss vóru partur av øllum uppvøkstrinum og upp í vaksnamannaárini.

### Kirstin veit mest

Tann, sum kanska veit eina mest um nebbasild í Føroyum í dag, man vera Kirstin Eliassen, lívfrøðingur, sum starvast á Havstovuni, har hon nú eisini er í holt við at skriva eina stóra phd-verkætlan um nebbasild. Hetta er eitt arbeiði, sum verður goldið av tí, sum rópt verður fiskivinnugransking og donsku stjórnini við helvtarbýti av útreiðslunum. Arbeiði við verkætlanini byrjaði í 2007, og nú verður so verkætlanin skrivað. Kirstin skrivaði eisini høvuðsuppgávu um nebbasild, tá hon las lívfrøði, og soleiðis hevur hon arbeitt við nebbasild og gransking av hesum fiskaslagi í fleiri ár tilsamans.

Hon sigur, at tað var Havstovan við Hjalta í Jákupsstovu á odda, sum eggjaði henni til at fara undir hesa verkætlan, tí nebbasild hevur so stóran týdning fyri fisk og sjófugl.



*Kirstin Eliassen, lívfrøðingur*

Regluligu nebbasildakanningarnar, sum Havstovan ger, eru partur av yngulkanningunum, sum Magnus Heinason ger á hvørjum ári um mánaðarskiftið juni/ juli. Tá yvirlitstrolingar verða gjørdar um várið og heystið, verða eisini magakanningar gjørdar av toski, hýsu og upsa, og tá verður skrásett, hvussu nógv nebbasild er í maganum á hesum fiskasløgum.

Kirstin er eisini við í øðrum kanningum av nebbasild, og herfyri var hon við norska havrannsóknarskipinum, G.O. Sars, sum gjørdi kanningar á stívliga 20 støðum í norska partinum av Norðsjónum. Hesar kanningar vístu, at væl var til av nebbasild á trimum støðum, meðan minni var at fáa á øðrum støðum, harav onkrar støðir royndust vánaligar.

Meðan aðrir veiða nebbasild, hevur veiða eftir hesum fiskaslagi verið bannað í føroyskum sjógvi í fleiri ár.

- Mínar kanningar vísa, at góða gýtingin av nebbasild, sum vit staðfestu við yngulkanningum í fjør summar, er komin væl til sættis, soleiðis at fiskurin, sum tá kom undan, framvegis er á lívi.

Hon sigur, at tað eru trý sløg av nebbasild í føroyskum sjógvi, men nebbasildin, sum vit tosa um – havnebbasildin – er nógv hin største parturin, og tí er tað henda sildin, vit tosa um sum grundarlag undir føði hjá fiski og fugli.

- Havnebbasildin veksur skjótt, og longu eftir einum ári er hon einar 12-13 sentimetrar long, sigur Kirstin.

### Góðar ábendingar

Lívfrøðingurin vísir á, at allar ábendingar siga, at nebbasildin er uppaftur betri fyri í ár enn í fjør, tá positiva gongdin av álvara varð staðfest.

- Vit kunnu siga, at fiskur etur tað, sum hann kemur fram á í sjónum, men vit hava eisini staðfest, at eitt nú toskurin er feitari, tá